Skeið fyri felagslimum og álitisfólki innan sáttmálaøki hjá FA

Føroya Arbeioarafelag skipar fyri tveimum skeioum fyri felagslimum og álitisfólki, skeioini veroa í viku 45.

Hvat er skeioio um?
Hvat er Føroya Arbeioarafelag?
Hvussu er føroyski arbeiosmarknaourin uppbygdur?
Hvat er sáttmálasamráoingar?
Hvat er eitt álitisfólk?

Nær verour skeioio?
Nr. 1 – mánadagin 4. nov. til mikudagin 6. nov.
Nr. 2 – mikudagin 6. nov. til fríggjadagin 8. nov.

Hvar verour skeioio?
í hølum FA's í Tjarnardeild 7, 100 Tórshavn

Tilmelding:
Tey io hava áhuga í at luttaka, veroa bioin um at booa frá hjá limafeløgunum.

Møguleiki er at gista – bioi um pláss hjá F. A.

Á hvørjum skeioi kunnu 20 fólk luttaka, og veroa skeioini bert um nóg stór undirtøka er.

Tilmelding í seinastalagi 18. oktober 2002.

Føroya Arbeioarafelag
Tjarnardeild 5-7
Postsmoga 56 · 110 Tórshavn
Tlf. 312101 faks 315374
t-post: fafelag@fafelag.fo

Lýsing

Vegna farloyvi í 1 ár verour søkt eftir fólki at gera reint í Tofta skúla. Reingeroin er 23,75 tímar um vikuna frá 01. november at rokna.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeioarafelag og FKA.

Skrivligar umsóknir veroa at senda til Nes kommunu, 660 Toftir, í seinasta lagi 28.10.2002.

Nærri upplysingar fáast vio at venda sær til Nes kommunu, tlf. 447586.

Nes Kommuna

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan Sp/f
Beinleiðis frá framleiðara

Cafeteria-leder

Fra 1. januar 2003 er stillingen som cafeterialeder for cafeteriaet i Mjørkadal ledig.

Vi søger en med uddannelse som kok eller med lignende kvalifikationer. Du skal være i stand til at disponere indkøb, økonomi og stå for den daglige produktion. Du skal have erfaring fra en ledende stilling i et cafeteria eller lignende.

Vi tilbyder en fuldtidsstilling på 37 timer om ugen med løn efter indsats under overenskomst med Forsvarets Civil-Etat, NYLØNs-aftalen.

Skriftlig ansøgning sendes til Færøernes Kommando senest 15. nov. 2002. Spørgsmål kan rettes til Peter Gram, tlf 341410 eller Preben Funch, tlf 341440.

Cafeteriaet i Mjørkadal sælger morgenmad og varm/kold frokost til ansatte på Færøernes Kommando og besøgende. Omsætningen er på knap 1/2 mio. kr. Udover cafeterialederen er der en fuldtidsansat køkkenmedhjælper.

Færøernes Kommando
Mjørkadalur
Postboks 3195
110 Tórshavn
Tlf. 311420

Skeiðsdepilin við Marknagil – SDM

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

Skeið í Assertión

5.-12.-19.-26. okt. og 3. des. 2002
kl. 16.00-20.00

Assertión er frálík, um tú vilt vita meira um títtegna viroi og sjálvsviroi. Tú verour betur førur fyri at taka avgeroir og at taka ímóti atfinningunum. Skeioio er fyri øll, io eru áhugao at arbeioa vio at menna seg sjálvi og arbeioa vio persónligum broytingum og nyhugsan.

Á skeioinum lærir tú um assertiónsviroi, um grundleggjandi rættindi
- um at seta krøv og avvísa krøv, um kenslur og vreioi, um kropsmál
- um føgur oro, at finnast at og taka ímóti atfinningunum, um hvussu tú umsitur títt vald og sjálvsviroi

Skeioleioari: Bergur Godtfred
Kostnaour: Kr. 3.000,00 írokn. frálæru, tilfar og mat
Tilmelding: í seinasta lagi 28. okt. 2002

Skeiosdepilin vio Marknagil
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374,
t-postur fh-sth@post.olivant.fo

Føroya Psykiatrifelag

Aðalfundur

Ársaoalfundur verour tann 15. november 2002.

Fundarskrá sambært lógum felagsins

Nevndin

Stórlosjufundur

Booao verour frá, at Stórlosjufundur verour leygardagin 19. oktober 2002 kl. 14.00 í Losjuni í Havn.

Føroya Stórlosja

Landsting

Booao verour frá, at Landsting Fráhaldsrørslunnar verour leygardagin 19. oktober 2002 kl. 16.00 í Losjuni í Havn.

Felagsnevnd Føroysku Fráhaldsfelag

Føroya Studentaskúli og HF-skeið

Hoydalar
FO-188 Hoyvík
Tlf. +298 312973 · Telefax +298 318624

Søkt verour eftir burdarvikarum í lærugreinunum **søgu** (umleio 16 tímar/viku) og **sálarfrøoi** (4 tímar/viku) frá 25. nov. 2002 til 10. juni 2003.

Størvini veroa sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsøkjarar uttan endaligt prógv kunnu eisini søkja.

Umsóknir skulu vera rektaranum í hendi í seinasta lagi 4. november 2002.

Til sølu
BMW 320i Coupe
(150HK) Myrkabláur
hevur koyrt uml. 83.000 km.
Alu-følgur, aircondition, el-sóltak, el-vindeygu, el-síðuspegl, servicehefti.

Verður seldur um hóskandi boð fæst
Ring á telefon 21 41 41 og hoyr meira

Vikuskifti
Nr. 196 • leygardagur • 12. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Ostaklokkan var firtin

Hetta var ikki nøkur vanlig ostaklokka, nei, hendan hevði vinir og kenningar kring allan knøttin, og so hevði hon eitt so øgiliga fínt ættarnavn. TUPPERWARE!

Lesið síðu 4 & 5

Fjalltíð

Heystið er komið, og hjá nógvum merkir tað, at nú er tað fjallið, mest verður hugsað um. Hvussu fer at roynast við veðri og maðki, og ikki minst, hvussu vektin man fara at verða

HEYST
Edvard Joensen

Telefonin ringir, og boðað verður á fjall í morgin. Vit møta klokkan sjey, og so verður farið til gongu beinanveg. Rættin er klár, so har er einki at hugsa um.

Jú, tað er eitt sindur av spenningi í luftini eitt sovorðið kvøld. Okkurt er at gera klárt, hóast hetta fjallið ikki verður roknað fyri so nógv. Høgligur hagi. Stutt at ganga, og rættin mestum við hús.

Annað er hjá teimum, sum kanska skulu liggja nátt. Alt eftir, hvussu veðrið háttar sær, og hvussu lætt er at koma aftur at húsum við skurðinum. Summir skulu reka um fjøll, og onkur skal eisini føra við báti.

Jú, broytt er, síðan Mikkjal á Ryggi yrkti um piltin, sum kom inn, spentur at skoða, við teimum orðum, at »fjallboð í morgin pápi bað boða«.

Tá var eisini ymiskt, sum leggjast skuldi til reiðar, áðrenn farið varð. Tó tað var sovorðið sum hetta og vøttir, sum neyðugt varð hildið at hava við, nú farast skuldi á fjøll á heystardegi.

Kanska kom kavi, og tú visti ikki, hvussu fór at enda. Um tú kanska komst at sita kaldur einastaðni í haganum. Kanska kom myrkur á, meðan haftseyðurin varð rikin at húsum?

Tað kundi vera so mangt, sum stakk seg upp ein slíkan dag. Og gamalt var, at allar ferðir vóru vandaferðir, so neyðugt var at vera væl útgjørdur, tá farið varð frá húsum.

Í dag verður ikki hugsað soleiðis. Mest er at syrgja fyri, at streymur er á fartelefonini, so ein ikki er uttan samband á fjøllunum. Tað kann vera at okkurt er at spyrja um á arbeiðsplássinum, og so er gott, at til ber at fáa samband við ein, hóast hann er á fjalli.

Ein húgva og ein jakki eru klár, og so einar ullintar hosur at fara innan fyri stuttu gummistyvlarnar, sum neyðugir eru í dag, so ein ikki gerst vátur um beinini í einum og hvørjum blota, sum er í haganum.

Skurðfjall er, so okkurt haft má eisini havast við. Men nógvastaðni er tað avlagt at binda seyðin niður, og gott er tað. Bæði fyri mannin, sum fella og býta skal, og ikki minst fyri seyðin sjálvan.

Í dag viga teir á rættini, og hvør seyður fær sítt nummar hongt upp á seg. Síðan verða nummar og vekt løgd inn á teldina, og eigaranavn og gyllinstal verða løgd inn. Síðan roknar teldan út, hvør eigur hvørt lambið.

Einki við at ganga og handla og lyfta. Klípa og royta, sum bara ger seyðinum ilt.

Og flettingin er eisini broytt munandi. Soleiðis at skilja, at fyrr var óhugsandi, at nakað var koyrt burtur. Alt uttan gor og gall varð nýtt, og alt, sum bleytari var enn bein, varð etið.

Í dag er tað so galið, at hjá summum verður bara sjálvt krovið tikið, og har, sum ringast stendur til, verður bara partur etin. Kjøtið skal ikki vera svart og ikki vera reytt. Ikki vera hart og ikki vera bleytt. Og er tað hvítt, er so púra knívskorið. Tá er ringt at gera við.

Blóðið rennur nógvastaðni beinleiðis í rennuna, og vombin fer ótømd í bingjuna hjá IRF. Hesum koma teir so í neyð av á brennistøðini, sum líður út í oktober.

Garnmørurin fer beinleiðis sama veg eins og skinnið. Onkur hendingur tímir at salta nøkur skinn og selja til MBM. Men bara um til ber at fáa tey fyri einki frá honum, sum flett hevur. Annars ber tað ikki til.

Høvdið, sum mangan hevur verið roknað sum veitslukostur, eta nógv als ikki. Teimum dámar ikki, at maturin liggur á borðinum og gløðir at teimum, verður sagt. Og innvølur er skaðiligur, vilja nýggir heilsuprofetar vera við, so har gerst einki.

Nei, tað stendur einki til við avroðunum soleiðis. Eingin vil kennast við og enn minni eta. Nógv smakkar illa, og tað mesta er skaðiligt.

So er valið hjá hvørjum einstøkum, um hann torir at fara í holt við alt hetta skaðiliga og koma sær í vanda fyri at doyggja av tí, ella hann bara letur vera at eta og doyr í hungri.

Tí vist er, at eitt vanligt vistfrøðiligt føroyskt lambskrov er valla verri kostur enn so mangt, innflutt verður.